# Nephew spælir í Gøtu

**Nephew fer spæla á G! Festivalinum í summar. Oddamaðurin í bólkinum er ættaður úr Gøtu, og hann vitjaði sum smádrongur í bygdini. Nú vitjar hann sum partur av einum tí best umtókta danska tónleikabólkinum seinnu árini**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Nephew áttu í fjør ársins hitt í donskum tónleiki, og teir hava havt fýra sangir av somu útgávu ovast á hitlistanum hjá DR. Í juli spæla teir í Gøtu*

Bólkurin Nephew er víðagitin í Danmark fyri sín fríska tónleik, sum veruliga hevur fingið danir í stórum tali at keypa teirra seinastu útgávu. Útgávan USADSB hevur selt dupultplatin, sum er 80.000 eintøk, og harafturat hevur Nephew vunnið eina rúgvu av tónleikavirðislønum seinasta árið.

Tá ið Danish Music Awards vóru lætnir her fyri var Nephew í uppskoti til fimm virðislønir, og teir vunnu allar – milum annað fyri bestu fløgu og besta sjónbandalag.

Ein av høvuðsmonnunum í bólkinum er Simon Kvam, sum millum annað er kendur úr sjónvarpsrøðini Drengene fra Angora, og hann hevur røtur úr Føroyum. Omma og abbi hansara eru úr Gøtu, og sum smádrongur var Simon Kvam á vitjan í Gøtu. Nú kemur hann aftur, men tað verður sum kendur tónleikari í einum tí besta umtókta danska bólkinum seinnu árini.

Sangirnir av seinastu útgávuni hjá Nephew hava verið nógv spældir í Danmark, og fýra av sangunum hava verið ovast á Tjeklistanum hjá Danmarks Radio – og tað hevur eingin annar bólkur megnað við somu útgávu.

### Fegnast um fongin

Fyrireikararnir av G! Festivalinum eru sera fegnir um, at tað hevur eydnast teimum at fáa Nephew at spæla í summar.

– Hetta má metast verða sannur fongur og ikki sørt ein heiður eisini, siga fyrireikararnir.

– Nephew spælir heilt fáar konsertir um árið og einans tríggir festivalar eru á skránni í summar, Zulu Rocks, Skanderborg Festival og nú G! Festivalurin. Hetta fer helst at hava við sær, eins og við Kashmir, sum eisini spældu heilt fáar konsertir í fjør, at »pílagrímar« úr norðanlondum leita sær til G! at hoyra júst hendan bólkin.

Umframt Nephew hevur G! Festivalurin eisini boðað frá, at útlendsku nøvnini Darude, Blue Foundation og Beats & Styles verða við á festivalinum í ár.

Tað ber til at lesa meira um bólkin Nephew á heimasíðuni hjá teimum – www.nephew.dk

# Musikmøti í Frelsunarherinum

**Sunnudagin verður musikmøti hjá Frelsunarherinum í Havn**

MUSIKMØTI
*tíðindaskriv*



*Í sambandi við vitjanina verða venjingar alt vikuskiftið*

Um vikuskifti fær hornorkestur Frelsunarhersins vitjan av dananum Knud Larsen. Knud, sum spælir trombone, er vice musikleiðari í Valby og er leiðari fyri ungdómsorkestrinum í samkomuni.

Í sambandi við vitjanina verða venjingar alt vikuskiftið. Sunnudagin kl. 11 verður alment møti har Knud Larsen saman við familjuni luttekur og kl. 18 verður skipað fyri musikmøti.

### Eitt orkestur við einum greiðum endamáli

Høvuðsmálið hjá orkestrinum er at vinna menniskju fyri Jesus Kristus gjøgnum sang og tónar, og at varðveita spælararnar í trúnni, m.a. gjøgnum sosialan og andaligan felagsskap.

Orkestrið hevur altíð nógv tiltøk á skránni, og hetta gevur spælarum nógvar minniríkar upplivingar:

»…sum spælari upplivi eg Ólavsøkuna sum eitt av hæddarpunktunum. Tá seinasti útifundurin verður hildin á miðnátt ólavsøkudag verður tjóðsangurin spældur. At merkja friðin, sum hesa løtuna søkkur oman yvir miðbýin tá fjøldin av hjarta syngur við – tá veit eg at hornspæl er nakað fyri meg.«

»…ein jólamorgun kl. 9 spældu vit sum vanligt uttanfyri Landssjúkrahúsið. Hóast tað var kalt og nakað av vindi, so verða vindeygu latin upp og sjúklingar og starvsfólk lurta eftir tónunum, sum minna á at ein Frelsari er okkum føddur. Nakrar dagar seinni frætti eg, at ein eldri maður, ið var innlagdur hevði sagt, at hesi fólk eiga nakað, ið mær væntar og sum eg má gera nakað við – áðrenn tað er ov seint.«

Vit ynskja at bjóða tær vælkomnan í Frelsunarherin sunnukvøldið kl. 18. Umframt horntónleik, verður eisini nógvur sangur á skránni og ein drekkamunnur verður at fáa eftir møtið.

## Vakrasti urtagarður í Klaksvík finnast

**Klaksvíkar býráð viðgjørdi mánakvøldið eitt uppskot um at heiðra vakrasta urtagarðin í Klaksvík**

URTAGARÐUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Millum mongu málini, sum Klaksvíkar býráð hevði til viðgerðar á fundi mánakvøldið, var eitt uppskot um at heiðra vakrasta urtagarðin í Klaksvík, og undirtøka er fyri hesum átaki.

Ætlanin er, at annaðhvørt ár skal vakrasti urtagarðurin í býnum finnast, og hann skal heiðrast á einhvønn hátt.

Ein nevnd, sum verður mannað við formanninum í mentanarnevndini, býargartnararanum og Karl Hera Joensen, skal finna fram til urtagarðin.

Tað hevur verið roynt áður at kjósa vakrasta urtagarð í Klaksvík, men hetta datt niður fyri. Nú ætlar kommunan aftur at seta sjóneykuna á grønu blettirnar í býnum við nýggja átakinum.

## Ársins talgilding skal finnast

Í vikuni er KT-dagurin 2005 á skránni. Evnið, ið fokus verður sett á hesa ferð, er talgildan. Serliga við atliti til talgildingarváttanum. Ein váttan, sum eftir øllum at døma vil økja trúvirði innan alnetissamskifti frameftir. Eitt nú hevur europaráðið hjá ES sum mál, sum talgilda undirskriftin skal tryggja frían handil uttan forðingar millum londini.

Umframt at tosa um møguleikar innan talgildan, so verður eisini avdúkað, hvør skal hava heiðurin fyri »ársins talgilding«. Finnast skal her fram til stovnin/fyritøkuna, sum seinastu tvey árini hevur havt serligt hegni og hepni við innføran og nýtslu av tildari loysn seinastu tvey árini. Og sum vera man, so verða heiðurslønir latnar vinnaranum.

-jm

## Vaksandi bilasøla

Eftir at fallið í bilasøluni í fjør var stórt, tykist talan nú aftur at vera um økta sølu

Tað má í øllum førum vera niðurstøðan, um metast skal eftir innflutningstølunum fyri fyrstu fýra mánaðirnar í ár.

Her er talan nevnliga um eina lítla øking í talinum av innfluttum bilum. 486 í ár í mun til 455 í fjør.

Serliga er tað talið av persónbilum, sum er økt hesar fyrstu fýra mánaðirnar. Her er økingin knøpp 18%. Hinvegin er talan um minking í nærum øllum øðrum bólkum. Ikki minst teimum, sum eru tengdir at vinnuligari ferðslu. Á einum øki er talan tó um stóra øking. Talið av innfluttum prutlum hevur higartil í ár verið 117. Í fjør var hetta talið 60.

-jm